# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Fyri 25 árum síðan:

## Tingmenn vitjaðu á Sornfelli






*Tíðindafólk og politikarar á Sornfelli f.v.: Ingi Samuelsen og Snorri Brend, Johannes Martin Olsen, (teir sum venda ryggin til, halda vit vera Adolf Hansen og Páll Vang), Frederik Olsen (á veg úr bussinum), Eli Nolsøe, Niels Bentsen, ríkisumboðsmaður, og Jan Müller, blaðstjóri á Sosialinum*

Leygardagin 12. mai 1984 hevur tíðindablaðið Sosialurin frásøgn frá eini vitjan hjá løgtingslimum á radarantennustøðini á Sornfelli, har kunnandi fundur var fyri tingmonnum og journalistum.

Orsøkin til vitjanina var, at í danska tíðarritinum Forsvar hevði verið ein avdúkandi grein um amerikansku støðina, og líkt var til at hetta kom ávart á føroyska almenningin og politikarar.

## Blákrossheimið 25 ár

25 ár eru liðin síðan Blákrossheimið í Havn varð sett á stovn. Byrjað var 6. mai 1984 í Kongagøtu, og í 1987 var flutt niðan í Lynggøtu, har stovnurin hevur hildið til síðan.

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri fólk við rúsdrekkatrupulleikum. Á heiminum fæst avrúsing, viðgerð og eftirviðgerð. Dentur verður lagdur á trivnað og góðan felagsskap í kristnum umhvørvi við samrøðum, samanspæli og samveru.




*Olga Magnussen er leiðari á Blákrossheiminum*

Á heiminum, sum hevur pláss fyri 15 innskrivaðum í senn, starvast leiðari, psykologur, lækni, sjúkrasystir, sjúkrahjálpari, prestur og fleiri onnur hjálparfólk við royndum innan viðgerð av rúsevnismisnýtslu. Heimið er góðkent sum viðgerðarstovnur av Føroya Landsstýri.

Leiðari á Blákrossheiminum er Olga Magnussen, sum tók við eftir Sólborg Dulavík í 2001.

Sólborg hevði tá verið leiðari, síðan heimið var

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma

**Sanna Guttesen**
Sørvágur

andaðist og varð jarðað.
Takk til tykkum á Sýnini, sum vóru um hana.
Takk til Ingu P. Dam, prest, og tykkum, sum vóru komin saman á Sýnini.
Takk til prest fyri góð orð í kirkjuni og til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Sørvágs kirkju og takk til øll tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Hans Jákup, Elmar, Anton, Ólavur, Sára, Heini og Sjúrður**

## Várfest við drama og uppboðssølu




**Dagurin**
**12. mai. Pancratius**, deyður í umleið 300. 13 ára gamal drongur, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

"Várfest" er heitið á einum nýggjum tiltaki, sum verður sunnudagin 17. mai í miðbýnum í Havn. Byrjað verður kl. 15. Skráin verður rættiliga umfatandi, og fyrireikararnir vænta nógv fólk henda dagin, og at tiltakið, sum er ókeypis, fær góða undirtøku.

Tiltakið byrjar við stórari skrúðgongu. Heðin Mortensen, borgarstjóri, setur tiltakið, og aftaná syngur barnakórið í Oasuni. Síðani verður møguleiki at uppliva fleiri av teimum kendu søgunum, sum eru í Bíbliuni. Søgurnar eru gjørdar til 10 stuttar leikir, ið verða framførdir á smáum pallum runt um í miðbýnum. Leikirnir eru samanhangandi, men hava hvør sín boðskap.

Eisini ber til at keypa sær okkurt til matna, meðan klovnar vísa síni kynstur, og á pallinum verður nógvurymiskur tónleikur, dukkushow, dansiframførsla o.a.

Luttøka verður m.a. eisini av 70 ungdómum frá bíbliueftirskúlanum Alterna í Danmark umframt motorsúkklufelagnum Cross-Bikers MC Føroyar. Býurin verður prýddur við bannara, vimplum og øðrum.

### Ókeypis suppa

Harumframt verður bjóðað øllum luttakandi ókeypis suppu á Vaglinum kl. 17.30. Og so verður ein uppboðssøla av málningum hjá fleiri føroyskum listafólkum – nevnast kunnu m.a. Eyðun av Reyni, Øssur Mohr, Edith Mørkøre, Maria Mørkøre, Eli Smith, Poul Skarðenni og Sámal Toftanes. Nakrir av hesum málningum verða málaðir á Vaglinum, samstundis sum tiltakið fer fram. Tað, sum inn kemur fyri uppboðssøluna, skal nýtast til at gjalda útreiðslurnar av tiltakinum. Verður nakað avlop, fer peningurin til vælgerandi endamál.

Eitt familjutiltak verður á pallinum kl. 19.00, og kl. 21.00 byrjar eitt stórt ungdómstiltak, har fleiri tónleikabólkar fara at framføra, samstundis sum kaféin verður opin. Eisini verða dansibólkar, drama og ymiskt annað spennandi á skránni.

Fyrireikararnir siga, at endamálið við tiltakinum er at skapa eitt umhvørvi, har bíbilski boðskapurin verður boðaður á ein spennandi, avbjóðandi, hugtakandi og stuttligan hátt við sangi, drama og upplivingum. Tiltakið er skipað av fleiri samkomum/kirkjum í Havn, sum luttaka á ymiskan hátt.

*mg*